# Reglugerð
## fyri
## Teknisku deild Fuglafjarðar kommunu

### Kapitul 1
### Endamál

§ 1. Endamálið við hesari reglugerð er at lýsa uppgávu- og ábyrgdarbýtið í Teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu fyri soleiðis at tryggja, at alt virksemið til eina og hvørja tíð er greitt og og kann gerast effektivt.
§ 2. Býtið í § 1 og samskiftislinjan eru lýst í viðheftu verkskipan (organisatiónsdiagrammi), "Verkskipan fyri Teknisku deild".

### Kapitul 2
### Arbeiðs- og matartíðir

§ 3. Vanliga arbeiðstíðin er millum kl. 08.00 og 17.00. Arbeiðsfólk skal møta til tíðina, og skal ikki fara úr arbeiði í úrtíð. Formaðurin skal síggja til, at hetta verður hildið.
§ 4. Klokkuskipanin í kommunuhøllini skal nýtast uttan undantak.
§ 5. Matartíðin er sambært galdandi sáttmálum:

- Morgundrekka: 09.30-09.45
- Døgurði: 12.00-13.00
- Seinnapartsdrekka: 15.00-15.15

### Kapitul 3
### Arbeiðsklæði

§ 6. Øll arbeiðsfólk fáa við starvssetan útflýggjað tvey sett av arbeiðsklæðum hvør umframt oljuklæði. Hereftir kunnu tey keypa arbeiðsklæðini lagaliga frá kommununi eftir tørvi. Formaðurin tekur ímóti bíleggingum, og útflýggjar klæðini
§ 7. Arbeiðsfólk skulu altíð vera í kommunuklæðunum, tá ið tey eru til arbeiðis.

### Kapitul 4
### Arbeiðsplanur og -býti

§ 8. Býarverkfrøðingurin gevur formanninum nýggjar uppgávur, neyðugar upplýsingar um hesar, umframt ynskta raðfesting av uppgávunum. Formaðurin skal síðan leypandi kunna býarverkfrøðingurin um, hvussu gongur við arbeiðinum.
§ 9. Formaðurin ger arbeiðsplan, býtir arbeiðið millum fólkið, og sær til at arbeiðið verður gjørt liðugt. Har til ber, skal formaðurin taka lut og ganga undan í arbeiðinum.
§ 10. Arbeiðsplanurin skal eisini innihalda vaktarplan fyri tíðina frá kl 17.00-08.00. Borgarar skulu altíð kunna ringja til eitt høvuðsnummar, sum síðan stillar um til vakthavandi.
§ 11. Formaðurin letur neyðug fólk til gartnara og vatn- og kloakkmeistara, sum síðan hava ábyrgd av at býta arbeiðið til hesi fólk.
§ 12. Um so er, at vatn- og kloakkmeistari, býargartnari ella húsavørðar, eftir at vera farnir í gongd við eitt arbeiði, hava tekniskar spurningar (spurningar til tekningar, dimensjónir, val av tilfari o.s.fr.), sum teir meta at býarverkfrøðingurin má taka støðu til, kunnu teir venda sær beinleiðis til býarverkfrøðingin.
§ 13. Formaðurin býtir amboð, maskinur og bilar út til fólkið, og syrgir fyri, at øll ásett viðurskifti, sum eru knýtt at hesum tólum, verða hildin.
§ 14. Formaðurin leigar bilar ella kranar, um tørvur er á hesum, men hann kann eisini velja at lata bólkaformenninar um hetta; um so er, eigur formaðurin at fáa boð um leiguna. Eru serligar langtíðaravtalur gjørdar av býarverkfrøðingi, skulu hesar fylgjast, men ber ikki til hjá bilum ella kranum at koma, verður valdur tann, sum fyrstur kann vera á staðnum.
§ 15. Formaðurin ger av, hvør hevur ábyrgdina av Ruskøkinum á Klovningi og grótbrotinum á Brúnarenda, og hann sær til, at reglugerðirnar fyri hesi øki verða hildnar.

### Kapitul 5
### Serligt um arbeiði býargartnarans

§ 16. Innan 1. juni á hvørjum ári skal býargartnarin koma við tilmæli til býráðið um ætlanir fyri árið, sum kemur. Tilmælið skal innihalda tey øki, sum býargartnarin mælir til at fara í holt við. Tilmælið skal innihalda tekning og kostnaðarmeting.
§ 17. Innan 1. januar á hvørjum ári skal býargartnarin hava boð um niðurstøðuna

viðvíkjandi tilmælunum og møguligar broytingar. Haraftrat skal býargartnarin hava gjøllig boð um onnur arbeiði, sum býráðið hevur ætlanir um at gera í árinum, sum byrjar.
§ 18. Býargartnarin fær játtan, sum er oyramerkt til hvørt arbeiði sambært timæli hansara og svarinum. Er talan um óvæntað arbeiði, verður serlig játtan latin til hetta.
§ 19. Býargartnarin hevur ábyrgd av, at játtan hansara verður nýtt, sum hon er ætlað. Hann bíleggur sjálvur tilfar, t.e. vøkstur, steinar o.t., og hann kann sjálvur leiga bilar og útbúnað annars, um tøvur er á tí.
§ 20. Býargartnarin kann sjálvur, í samráð við formannin, keypa amboð, sum eru serlig fyri gartnaraøkið. Hetta verður ikki tikið av játtan hansara.
§ 21. Hevur býargartnari tørv á fólki, verður hetta ikki tikið av játtan hansara, men tímar verkamannana verða játtaðir av formanninum.
§ 22. Um býargartnarin av onkrari orsøk ikki sleppur at arbeiði sínum, ella hann í løtuni er í uppisetri við arbeiði, skal hann boða formanninum frá, soleiðis at hann kann taka lut í øðrum arbeið

## KAPITUL 6
## SERLIGT UM KAVAGREVSTUR OG SALTING

§ 23. Býarverkfrøðingurin skal gera almennu ásetingarnar fyri, hvussu grivið og saltað verður. Hetta ber í sær gerð av fastari koyrileið fyri maskinur, áseting av hvørji øki skulu saltast, og í hvørjum førum tørvur er á salting.
§ 24. Formaðurin skal, í tráð við tað, sum nevnt er í § 23, gera av, nær grivið og saltað verður. Formaðurin ger vaktarplan fyri kavarudding og salting, og hann metir sjálvur um neyðugu arbeiðsorkuna, og hvørt fleiri maskinur skulu nýtast.
§ 25. Maskinførarar skulu ansa eftir at grevsturin verður til minst møguligan ampa fyri íbúgvar og akfør.
§ 26. Um skaði hendir á annans mans ogn ella persón, skal maskinførari beinanvegin boða formanninum frá, og hesin skal síðan koma á staðið. Formaðurin gevur býarverkfrøðingi frágreiðing, og býarverkfrøðingurin avgreiðir endurgjaldsspurnignar.
§ 27. Koyrandi skal vera kl. 07.00. Undantøk kunnu einans vera gjørd tá ið kavaavfallið er óvanliga nógv.

## KAPITUL 7
## AMBOÐ, MASKINUR OG BILAR

§ 28. Formaðurin hevur ábyrgdina av, at allur útbúnaður er í lagi, at hann er tryggur og verður hildin við líka. Tann persónur, sum arbeiðir við útbúnaðinum hevur skyldu til at boða formanninum frá, um tørvur er á umvæling.
§ 29. Formaðurin hevur ábyrgd av at øll servicueftirlit av bilum og maskinum verða gjørd til tíðina, at olja verður skift, og neyðugar umvælingar verða gjørdar. Bilar og maskinur skulu vaskast innan og uttan hvønn fríggjadag, og bilarnir skulu polerast (bonast) 4 ferðir árliga, t.v.s. hvønn ársfjórðing. Loggbók skal fyriliggja og skal verða førd sohvørt.
§ 30. Reglugerðin fyri maskinur og amboð kommunurnar skal annars verða yvirhildin.
§ 31. Lyklar til maskinur og bilar skulu vera tøkir í kommunuhøllini
§ 32. Formaðurin skal ansa eftir at allir maskin- og bilførarar hava neyðug prógv.

## KAPITUL 8
## KOMMUNUHØLLIN

§ 33. Kommunuhøllin skal altíð vera stongd.
§ 34. Øll fólk í Teknisku deild hava lykil til høllina.
§ 35. Tað er ikki loyvt at arbeiða upp á privatbilar ella privat arbeiði annars í kommunuhøllini

## KAPITUL 9
## INNKEYP

§ 36. Formaðurin keypir inn tilfarð til amboð, maskinur og bilar, t.e. olju, filtur, pakningar, sápu o.s.fr. Arbeiðsfólkið kann eisini keypa í samráð við formannin.
§ 37. Formaðurin keypir inn øll vanlig amboð, men arbeiðsfólkið kann eisini keypa amboð í samráð við formannin. Íløgur í amboð omanfyri kr. 5.000 verða gjørdar í samráð við býarverkfrøðingin.
§ 38. Býarverkfrøðingurin stendur fyri størri íløgum í útbúnað, maskinur og bilar. Hetta verður gjørt í samráð við formannin, sum kann siga frá royndunum við útbúnaðinum.
§ 39. Formaðurin sær til, at arbeiðsklæðir altíð eru á goymslu.

## Kapitul 10
## Skeiðsvirksemi

§ 40. Býarverkfrøðingurin skal upplýsa formannin um nýggj skeið, sum verða boðin út. Somuleiðis skal formaðurin upplýsa býarverkfrøðingin um skeið, sum hann kundi hugsað sær, at hann sjálvur ella arbeiðsfólkið tók.
§ 41. Býarverkfrøðingurin og formaður gera í felag av, hvørji skeið eru viðkomandi fyri arbeiðsfólkið.
§ 42. Formaðurin ger av, hvør skal á skeið, og hvat skeið viðkomandi skal á, hetta sambært § 42. Somuleiðis ger formaðurin av, nær fólk skula á skeið.
§ 43. Um so er, at onkur kundi hugsað sær skeið, annað enn tað, sum nevnt er av býarverkfrøðingi ella formanni, kann hann ella hon gera formannin varugan við hetta.
§ 44. Øll skeið eru ókeypis fyri arbeiðsfólkið.

## Kapitul 11
## Trygd

§ 45. Býarverkfrøðingurin skal upplýsa formannin um broytingar í trygdarkrøvum Arbeiðseftirlitisins.
§ 46. Formaðurin hevur ábyrgd av, at arbeiðsfólkið arbeiðir undir tryggum umstøðum, og at øll trygdarkrøv, sum m.a. verða kravd av Arbeiðseftirlitinum verða hildin.
§ 47. Býarverkfrøðingurin skal upplýsa formannin um møgulig nýggj skeið ella skeið, sum hesin heldur vera viðkomandi.
§ 48. Formaðurin hevur ábyrgd av, at viðkomandi arbeiðsfólk kemur á trygdarskeið, sum annaðhvørt eru kravd ella vera hildin at vera neyðug.
§ 49. Arbeiðsfólkið skal nýta alla vanliga trygdarútgerð, tá ið arbeitt verður.
§ 50. Gerst onkur varugur við eitthvørt við útbúnaðinum ella arbeiðsplássinum, sum ikki er í lagi, og sum kann elva til skaða, skal hann ella hon beinanvegin boða arbeiðsformanni frá.
§ 51. Um so er, at onkur kundi hugsað sær at fingið trygdarskeið ella -útgerð onnur enn tey, sum nevd eru av býarverkfrøðingi ella formanni omanfyri, skal hann ella hon gera formannin varugan við hetta. Formaðurin metir síðan um fyrispurningin saman við býarverkfrøðinginum.
§ 52. Øll útgerð og øll skeið, sum nevnd í hesum kapitli, eru ókeypis fyri arbeiðsfólkið.

## Kapitul 12
## Frítíð og sjúka

§ 53. Allar frítíðarætlanir verða lagdir til rættis av formanninum.
§ 54. Um so er, at arbeiðsfólk vilja hava frí/frídag, skal avtala um hetta vera gjørt við formannin.
§ 55. Sjúka ella forfall skal fráboðast til formannin skjótast til ber. Hevur formaðurin frí, er hann sjúkur ella hevur forfall, skal varamaður hansara hava boðini.
§ 56. Frítíð formansins verður avtalað við býarverkfrøðingin. Fráboðan um sjúku ella forfall formansins skal boðast til varamann hansara umframt býarverkfrøðingin.

## Kapitul 13
## Starvsfólkasamrøður

§ 57 Tvær ferðir árliga ella eftir tørvi skipar tekniska deildin saman við býráðsskrivaranum fyri fundi fyri alt arbeiðsfólkið.
§ 58 Starvsfólkasamrøður verða hildnar tvær ferðir árliga. Samrøðurnar verða hildnar millum einstaka arbeiðsfólkið, býarverkfrøðingin og býráðsskrivaran.
§ 59. Um so er, at onkur kennir seg órættvíst viðfarnan, ella eru viðurskifti, sum á annan hátt eru óloysilig, kann viðkomandi skrivliga venda sær til Teknisku nevnd.

## Kapitul 14
## Starvssetan og uppsøgn

§ 60. Formaðurin metir um tørvin á fólki. Er tørvur á fleiri fólkum, skal formaðurin biðja býarverkfrøðingin um loyvi at seta fleiri fólk í starv.
§ 61. Starvssetan verður framd av formanni í samstarvi við býarverkfrøðingi og býráðsskrivara. Øll, sum verða sett í starv, skulu hava setanarbræv. Somuleiðis skulu øll, sum eru í starvi tá ið hendan reglugerð kemur í gildi, men ikki hava setanarbræv, fáa setanarbræv.
§ 62. Vil formaðurin hava fólk loyst úr starvi, verður hetta somuleiðis gjørt í samstarvi við býarverkfrøðing og býráðsskrivara.

## Kapitul 15
## Rúsdrekka

§ 63. Rúsdrekkapolitikkur landsins er galdandi fyri øll, ið eru í starvi hjá Fuglafjarðar kommunu.
§ 64. Tað er strangliga bannað at drekka ella at keypa rúsandi løg í arbeiðstíðini.

## Kapitul 16
## Gildiskoma

§ 65. Hendan reglugerð kemur í gildi hin 26. juni 2008.